# Skips Sosialurin
- TÍÐINDI TIL SJÓFÓLK





**Nú er tað gjørligt hjá okkara sjófólki at fylgja við hvat hendir**

Fá ein heilan Sosial sum e-mail, hvørja ferð hann kemur út.

Henda útgáva er gjørd á ein slíkan hátt, at hon fyllir minst møguligt og tískil skjót at heinta niður. Hetta er gjørt við at grafikkurin er tikin burtur, so einans teksturin er eftir og síðani pakkaður niður. Blaðið er sjálvútpakkandi á telduni og verður lisið við browsara, umframt at møguleiki er fyri at skriva alt blaðið út.

Útgávan er serliga ætlað okkara sjófólki, ið hevur atgongd til e-mail umborð á skipinum.

Stuðlað Skips Sosialin hevur

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag

Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

*Undirritaði teknar seg sum haldara av Skips - Sosialinum og fái fyrsta mánaðin ókeypis*

Navn á skipi:
Kontakt pers.:
e-mail:
Undirskrift:

**Hava tygum spurningar í hesum sambandi ring 213982 ella e-mail:** *skipssosialurin@sosialurin.fo*

☐ *Tekst útgáva*
☐ *HTML útgáva* *( uttan útskrift )*
☐ *HTML útgáva* *( við útskrift )*

Sosialurin




# Svimjihøllin skal vera roykfrí

**Tórshavnar Býráð hevur álagt leiðsluni í Svimjihøllini í Havn, at øll høllin skal gerast roykfrí skjótast gjørligt**

FORBOÐ
*Heri á Rógvi*


*At svimja er gott fyri heilsuna, og royking gagnar ikki heilsuni. Tískil fer Svimjihøllin í Gundadali at áseta roykiforboð*

Tað verður ikki longur møguligt at festa sær í Svimjihøllini í Gundadali í Havn. Mentanarnevndin hjá Tórshavnar Býráð hevur álagt leiðsluni í Svimjihøllini at gera alla svimjihøllina roykfría. Heri á Lava Olsen, stjóri í Svimjihøllin, sigur, at hann hevur móttikið eitt skriv, ið er dagfest 22. februar, at Svimjihøllin skal gerast roykfrí beinanveg. Hetta merkir, at øll Svimjihøllin sum hon er verður roykfrí, t.e. ikki verður loyvt at roykja nakrastaðni í Svimjihøllini. Hetta merkir eisini, at starvsfólkið í Svimjihøllini heldur ikki sleppur at festa sær í Svimjihøllini.

– Starvsfólkið hevur eisini víst eitt sindur av misnøgd yvirfyri hesum, men vit verða noyddir at fylgja boðunum. Fleiri av okkara viðskiftafólki dáma væl at festa sær í eftir ein túr í hylinum, men hetta verður ikki møguligt longur, sigur Heri á Lava Olsen.

Fleiri av starvsfólkunum í Svimjihøllini roykja, men hesi mugu so finna seg í teir nýggju reglarnar.

Enn er forboðið ikki sett í verk, men hetta verður væntandi gjørt innan leingi. Avgerðin um at gera Svimjihøllini roykfría byggir á eina samtykt hjá Mentanarnevndin frá 2000, t.e. undanfarna býráð. Nú sær tú so úttil, at álvara verður gjørdur burturúr ætlanunum.

Jan Christiansen, býráðsformaður, sigur, at Tórshavnar Kommuna hevur tann politikk á økinum, at ikki skal kunna roykjast, har almenningurin hevur atgongd. Í førinum við Svimjihøllini er talan um eitt heilsustað, har tað ikki verður mett hóskandi, at fólk festa sær í.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður fyri Starvsmannafelagið, sigur, at teir kenna til trupulleikan við royking. Sjálvur vildi hann helst havt tað soleiðis at eingin roykti, men hann sigur, at fólk bara mugu ásanna, at nógv starvsfólka roykja, og hesi mugu oftast eisini fáa møguleikan at gera hetta.

Sostatt verður ikki møguligt at dempa heilsuna við einari sigarett eftir svimjitúrin longur. Ikki inni í Svimjihøllini í øllum førum.


# Sosialurin & Internet Sosialurin
# ÓKEYPIS





Nú Sosialurin fyllir 75 ár í ár, so ber tað til at gerast haldari av Sosialinum ókeypis restina av hesum ársfjórðinginum. Samstundis loyva vit okkum at senda tykkum eitt uppkrav fyri aprílársfjórðing.

Tíðindablaðið
Sosialurin

Undirritaði ynskir at fáa Sosialin sendandi ókeypis í mars mánað og teir uppkrav fyri aprílársfjórðing sendandi

ÓKEYPIS

Navn:
Bústaður:
Post nr., bygd, býur:
Telefon:
e-mail:
Undirskrift: